## Kyndils-venjarar gevast

Hannis og Uni Wardum eru ikki longur venjarar hjá besta kvinnuliðnum hjá Kyndli. Tað skrivar heimasíðan hjá Kyndli. Hetta er næsta árið, at teir báðir hava havt ábyrgdina av Kyndilskvinnunum, men sambært heimasíðuni hjá Kyndli eru felagið og venjararnir komin ásamt um at steðga samstarvinum beinanvegin. Arbeiðið við at finna nýggjan venjara er í gongd, og Kyndil vónar, at úrslit fer at spyrjast burturúr innan fáar dagar. Kyndil hevur einki stig fingið í Sunset deildini í hesum kappingarárinum.



## Havnarmenn leingja á Argjum

Kenneth Jacobsen og Janus Joensen, sum eru uppvaksnir í ávikavist B36 og HB, hava longt sínar sáttmálar við AB. Kenneth Jacobsen og Janus Joensen verða í komandi kappingarári partur av AB-liðnum, sum ætlar sær at stríðast fyri sessinum í Formuladeildini. Havarmenninir hava longt avtaluna við felagið, skrivar heimasíðan hjá AB. Kenneth Jacobsen hevur, undantikið í 2008, altíð spælt við B36. Janus Joensen spældi í sjey ár við HB, har hann millum annað vann fýra FM-heiti.

# Takast við Costa Rica í dag

**Bæði Føroyar og Costa Rica hava higar til staðið seg nakað betur, enn styrkismetingin undan kappngini legði upp til**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir frídag í gjár skal føroyska OL-liðið í talvi aftur í eldin í dag.

Seinnapartin dystast Føroyar móti Costa Rica, sum er styrkismett sum nummar 66 av teimum 154 londunum, sum taka lut í OL. Føroyar eru styrkismettar sum nummar 73, men higar til er føroyska úrtøkan somikið góð, at Føroyar eru at finna sum nummar 57.

Í OL í Bled í Slovenia í 2002 vunnu Føroyar 2,5-1,5 móti Costa Rica. Ta ferðina vann Eyðun Nolsøe sítt talv, meðan John Arni Nilssen, John Rødgaard og Heini Olsen telvdu remis á sínum borðum.

Undan talvinum í dag er Costa Rica nummar 44, og hav teir ein stórmeistara og tríggjar altjóða meistarar á sínum liði. Hjá føroyingunum eru Helgi Dam Ziska og John Rødgaard altjóða meistarar, meðan við – enn – ikki hava nakran stórmeistara.

*Eftir at hava hvílt seg í gjár skal føroyska talvlandsliðið aftur í altjóða eldin í dag, tá Costa Rica er mótstøðuliðið*



# Allan Simonsen limur í Hall of Fame

**Allan Simonsen fekk miklan heiður, tá danir lótu tær árligu fótbóltsvirðislønirnar**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin, tann 55 ára gamli Allan Simonsen fekk mánakvøldið ein stórfingnan heiður, sum fáum verður unt.

Saman við 86 ára gamla Carl Aage Præst, varð Allan Simonsen tikin uppí »Hall of Fame«", sum bert er unt teimum fáu og serligu innan fótbóltin í Danmark.

Carl Aage Præst varð yrkisspælari í Italia, og vann OL-bronsu fyri Danmark í 1948.

Allan Simonsen gjørdi veruliga vart við seg í týska felagnum, Borussia Mönchengladbach og katalanska stórfelagnum, FC Barcelona í 1970-árunum og 1980-árunum. Allan Simonsen gjørdist ársins spælari í Evropa í 1977. Hann er einasti dani, sum hevur fingið hendan heiður. Allan Simonsen varð eisini við til at spæla Danmark í tað fyrsta endaspælið í nýggjari tíð, tá Danmark spældi seg til EM-endaspælið í 1984.

Ikki minst takkað verið brotssparksmálinum, sum Allan Simonsen skeyt í minniliga 1-0 sigrinum hjá Danmark á Wembley. Allan Simonsen spældi 55 landsdystir fyri Danmark.

So tað varð also ikki harra hvør sum helst, sum var føroyskur landsliðsvenjari í fýra undankappingum báðumegin aldarskiftið. Umframt Allan Simonsen og Carl Aage Præst, so eru Michael Laudrup, og evropameistararnir frá 1992, eisini partur av danska »Hall of Fame«.

*Tað var fyrrverandi landsliðsfelagin, Søren Lerby, sum handaði Allani Simonsen virðislønina, tá fyrrverandi føroyski landsliðsvenjarin varð heiðraður við plássi í danska Hall of Fame*
*Mynd: Polfoto*

